# StÍF fekk durðafjórðingin

*Hondbóltur: Leingi var líkt til, at StÍF skuldi vinna ein sera týdningarmiklan sigur á Neistanum, men seinastu minuttirnar av dystinum megnaði neistaliðið at venda gongdini, og harvið gera FM-heitið til eitt millumverandi millum Neistan og VÍF*



*Tá Pauli rendi einmansherin hjá Neistanum, Áka Olsen, um koll, datt hesin beint á Alexandur, sum í fallinum beklaði, og vað hetta ein stórur smeitur fyri StÍF*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

JÁKUP MØRK

StÍF-Neistin 23-24 (11-9)

Um so var, at onkur hendinga áskoðari var í iva um týdningin av dystinum inni á Skála sunnudagin, so var hesin skjótt sannførdur um, at okkurt heilt serligt var á vási. Høllin var nevnliga stúgvandi full av viðhaldsfólki hjá teimum báðum liðunum, sum nú skuldu royna seg, og spenningurin komst heldur ikki av ongum.

Talan var nevnliga um tvey av liðunum, sum framhaldandi høvdu møguleika at vinna FM-gullið í fremstu mansdeildini, og hjá báðum ráddi sjálvsagt um at vinna dystin.

Krøvini vóru kanska harðast hjá strandingum, tí meðan neistamenninir kundu tola at tapa dystin, so vóru teir á heimaliðnum fullgreðir um, at eitt tap hevði við sær, at FM-dysturin skuldi avgerast millum Neistan og VÍF, við strandingum sum passivum áskoðarum á síðulinjuni.

### Fjáltursstungið

Tað sást eisini aftur í spælinum á vøllinum, at leikararnir høvdu nógv at hugsa um henda dystin. Í nógvum førum tóktist tað í hvussu so er soleiðis, at leikararnir als ikki hugsaðu nóg kølið, og serliga kom hetta til sjóndar í skotroyndunum hjá leikarunum.

Ikki tí, málverjarnir báðir, Johan og Bogi, vardu mál síni ótrúliga væl, men rættuliga ofta var talan eisini um óneyvar skotroyndir, sum antin fóru við síðuna av málinum, ella sum málverjarnir megnaðu at bjarga.

Nakað skipað spæl sást heldur ikki tað stóra til. Hjá strandingum hekk tað kanska eitt sindur betur saman, meðan spælið hjá Neistanum í stóran mun var bygt á einmansherin, Áka Olsen. Vanliga hevur Heini Joensen eisini hjálpt væl til, tá tosað verður um málskjóting, men sunnudagin varð hann mansvardur so at siga allan dystin, og hetta viðførdi eisini, at hann ongantíð kom rættuliga inn í dystin.

Annars var tað Neistin, sum byrjaði dystin betur, men tá einir 20 minuttir vóru leiktir, megnaði StÍF at vinna seg fram um, og hesa leiðsluna hildu teir fast um fram til hálvleikssteðgin.

### Rútman fór

Fyrstu løtuna av seinna hálvleiki megnaði heimaliðið rættuliga at gera um seg, og trý mál á rað fingu rættuliga sett ferð á áskoðararópini, sum nú dundu oman yvir leikararnar.

Spælið hjá Neistanum hekk so at siga als ikki saman hesa løtuna, og teir høvdu sera trupult við at spæla seg ígjøgnum vælvirkandi StÍF verjuna.

Fagnaðarrópini frá áskoðarunum slakaðu tó nakað, tá heimaliðið innan ein lítlan minutt misti bæði Alexandur og Sveinbjørn, sum báðir fram til hesa løtuna áttu sín stóra leiklut í viðrákinum hjá heimaliðnum.

Skaðin hjá Alexandur kom, tá Áki Olsen og hann kapprunnu í einum kontraálopið hjá Neistanum. Umframt teir báðar var Pauli Hansen eisini við í kapprenningini, og tá hesin rendi Áka um koll, datt hann beint á Alexandur, sum í fallinum beklaði, og noyddist at gevast.

Í næsta álopinum lá Sveinbjørn eftirá, og hóast hann kom aftur á vøllin seinni, so var sjónligt, at hetta hevði brotið ein part av rútmuni hjá heimaliðnum.

Neistaliðið fekk nú eisini alsamt betri tak á strandingum, men tað var kortini líkt til, at heimaliðið skuldi fara avstað við stigunum, ikki minst takkað verið Johan, sum framhaldandi stóð seg sera væl í málinum.

Í hinum endanum gekst nú ikki eins væl hjá Boga, men eftir at hann hevði verið á beinkinum eina løtu og hvílt seg, kom vend í.

Neistin bardi seg upp á 21-19, men tá StÍF aftur fekk tvey mál á rað, var líkt til, at dysturin var avgjørdur, tí nú vóru bert einir sjey minuttir eftir at leika.

### Góvust ikki

Bláu leikararnir góvust tó ikki, og tá fimm minuttir vóru eftir at leika, tók dysturin eina avgerandi vend. Støðan var 23-20, tá Artur slapp ígjøgnum neistaverjuna, men Bogi bjargaði frágera væl, og í mótálopinum fekk Neistin minkað munin niður í tvey mál, samstundis sum Sveinbjørn varð útvístur.

Framvegis vóru tvey mál á muni, men tá John í næsta strandaálopinum avsluttaði óneyðuga skjótt, fekk Neistin aftur minkað um munin, og nú var sjónligt, at teir á heimaliðnum gjørdust alt meira ráðaleysir.

Tvey álop á rað megnaðu teir ikki at leika seg ígjøgnum neistaverjuna. Fyrstu ferð varð dømt fyri nøl, og aðru ferð varð bólturin tveittur burtur, og tá Áki Olsen megnaði at revsa strandingar báðu ferðirnar, var Neistin nú brádliga á odda.

Neistaverjan, sum nú rættuliga tóktist at rigga, megnaði eisini at steingja fyri seinastu álopsroyndini, men hetta var kortini ikki uttan eitt sindur av dramatikki. Tá fimm sekund vóru eftir hevði StÍF fríkast, og klokkan í høllini varð steðgað. Dómaraborðið gloymdi tó at seta klokkuna í gongd aftur, og hóast álopsroyndin ikki gav mál í fyrsta umfarið, so hildu strandingar á fram at spæla.

Dómararnir steðgaðu tó spælinum, so gjørdu greitt, at dysturin var lokin, og so kundu neistaleikararnir fegnast um sigurin.

Strandingur tóktust heldur ikki at ilskast inn á hetta, tí eingin ivi var um, at tíðin tá var lokin, men spurningurin er, hvat hevði hent, um álopsroyndin hevði givið mál í fyrstu atløgu, tí hóast klokkan tá vísti 29:55, so mundi tað í øllum førum vera nær við, at fimm sekund vóru liðin, frá tí at fríkasti varð tikið, til roynt varð at skjóta.

### Gullvónin brostin

Fyri strandingar hevur tapið við sær, at teir hava mist møguleikan fyri at endurvinna FM-heitið, og tað í sær sjálvum er uttan iva eitt stórt vónbrot.

Liðið kann tó framvegis hava eitt orð at siga í hesum sambandi. Um eina viku koma vestmenningar inn á Skála, og kravið til teirra er eins greitt, og tað var hjá strandingum sunnudagin. Alt annað enn ein sigur til VÍF vil nevnliga viðføra, at teir eisini eru úti av gulldystinum, og at seinasti leikdagurin tískil bert verður ein spurningur um, hvørt silvurmerkini skulu handast á Skála ella í Vestmanna.

### Full ferð á

Neistaliðið tykist framhaldandi at koyra við fullari ferð. Higartil hava teir tíggju dystirnir í endaspælinum givið fulla úrtøku, og megna teir at halda fast um hetta, so er FM-heitið teirra.

Orsøkirnar til framgongdina nú, sæð í mun til dystirnar í grundspælinum eru helst fleiri. Millum annað er einki at ivast í, at leikararnir nú eru betri samanspældir enn fyrru hálvuna, men størsti munurin man helst vera hugburðurin, sum leikararnir hava við sær á vøllin.

Tað er nevnliga komið fyri fleiri ferðir seinastu dystirnar, at liðið hevur reist seg aftur, hóast teir í løtum hava verið fleiri mál aftanfyri. Í grundspælinum hendi hetta so at siga als ikki, og millum annað taptu teir stórt fyri bæði strandingum og vestmenningum.

Í endaspælinum hava teir hinvegin megna at vent dystum móti bæði VÍF, Kyndli og StÍF, soleiðis at teir hava fingið tvey stig burtur úr, hóast tað til tíðir hevur sæð svart út, og einki er at ivast í, at hetta treiskni er komið teimum til góðar.

Har umframt tykist tað eisini soleiðis, at avrikini hjá liðnum ikki eru eins nógv tengd at, hvussu úrtøkan hjá Heina Joensen og Áka Olsen er. Hesu ferð var Heini hildin so at siga uttan fyri dystin, men kortini megnaðu liðfelagarnir at fáa nóg mikið av málum til at tryggja sigurin.

Komandi vikuskiftið skal Neistin á heimavølli royni seg móti Tjaldrinum, áðrenn teir í seinasta dystinum skulu til Vestmanna. Ein dystur sum kann gerast avgerandi fyri FM-heitið, tó at neistaleikararnir helst einki hava ímóti, at strandingar taka spenningin burtur úr hesum dystinum við at vinna á VÍF komandi vikuskifti.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
StÍF: John Petersen 6 (4), Alexandur Johansen 4, Jónleif Sólsker 4, Sveinbjørn Poulsen 3, Pauli Hansen 2, Marius Joensen 2, Bent Durhuus 1, Artur Johansen 1 (1)
Neistin: Áki Olsen 9, Áki Mørk 5, Heini Joensen 4 (2), Karl Oddmar Rasmussen 3, Finnur Hansson 2, Rani Slættanes 1
**Brotskøst:**
StÍF 6, Neistin 2
**Útvísingar:**
StÍF 2, Neistin 4
**Dómarar úr Kyndli:**
Hanus Kúrberg og Hans Thomassen



*Leingi var líkt til, at frálíka avrikið frá Johan Danielsen skuldi tryggja StÍF bæði stigini*

***Mynd: Álvur Haraldsen***



# Vit vilja hava silvur

*Venjarin hjá StÍF, Jónleif Sólsker, var ikki sørt vónbrotin eftir tapið móti Neistanum, men kortini helt hann ikki, at kappingarárið nú er liðugt fyri teirra viðkomandi*

JÁKUP MØRK



*Jónleif Sólsker sigur, at vestmenningar avgjørt ikki skulu vænta sær ein léttan dyst komandi vikuskifti*

Eftir at StÍF sunnudagin mátti lúta fyri Neistanum, er í øllum førum greitt, at FM-steypið skal flyta bústað komandi árið.

Venjarin hjá StÍF, Jónleif Sólsker, ásannaði eisini, at FM-gullið nú verður ein spurningum, sum Neistin og VÍF skulu svara, men kortini legði hann afturat, at strandingar framvegis ætla sær at vinna teir báðar dystirnar, sum eru eftir.

- Eingi ivi skal vera um, at vit ætla okkum at vinna silvurmerkini, og hetta krevur sigrar í teimum báðum seinastu dystunum, so vestmenningar skulu avgjørt ikki vænta sær nakran léttan dyst, tá teir koma her um eina viku, segði ein avgjørdur StÍF venjari.

### Takka fyri seinast

Tá vit spurdu Jónleif um, hvat munurin var á liðunum báðum sunnudagin segði hann, at avgerandi løtan var, tá Bogi bjargaði atsóknini frá Artur, tá StÍF hevði møguleikan at leggja seg á odda 24-20.

- Ístaðin skora teir upp á kontraálop, og tá vit samstundis fáa eina útvísing, gevur hetta teimum rættuliga blóð upp á tonna, heldur venjarin fyri.

Spurdur um hann ikki helt, at tapið sunnudagin fór at hava við, sær menninir ikki verða nóg uppsettir til dystin móti VÍF helt Jónleif Sólsker, at hetta ikki fór at verða nakar trupulleiki. Hinvegin helt hann, at spælið kanska kundi gerast betur, tí sunnudagin var sjónligt, at menn tóktust darvaðir av nervum, og at spælið tískil ikki riggaði, sum tað skuldi.

At enda legði hann afturat, at tá StÍF fyri einum ári síðani gjørdist føroyameistari var hetta millum annað neistanum at takka fyri, tá teir í næst seinasta umfarinum vunnu á Kyndli, og harvið góvu strandingum møguleikan fyri at vinna gullmerkini.

- Tí er tað kanska hóskandi, at vit nú takka teimum fyri hetta, við at vinna á vestmenningum og harvið handa Neistanum gullmerkini.

# Ein minni um stríðið

*Millum áskoðararnar inni á Skála sunnudagin var venjarin hjá vestmenningum, Hjalmar Klein Olsen*

JÁKUP MØRK

Á veg út úr Ítróttarhøllini á Skála bóru vit eyga á venjaran hjá VÍF, Hjalmar Klein Olsen, sum við stórum áhuga hevði fylgt við, tá sambiðlarnir hjá VÍF brustu saman.

### Ikki nakar fyrimunur

Spurdur hvat hann helst um úrslitið í dystinum segði hann, at hetta fyrst og fremst hevði við sær, at VÍF nú hevur ein kappingarneyta minni í stríðnum um FM-gullið.

Hann legði tó afturat, at tað als ikki er víst, at hetta hetta vil viðføra, at endaspurturin hjá VÍF verður nakað léttari.

- Kanska verða strandingar nú ikki eins uppsettir til dystin móti okkum, men hetta nýtist als ikki at verða nakar fyrimunur fyri okkum. Nú kunnu teir jú spæla nógv meira frígjørt í tí dystinum, og kanska vil hetta viðføra, at spælið fer at ganga betur, segði Hjalmar, sum við hesum ásannaði, at talan verður um eina alt annað enn létta uppgávu, tá teir um eina viku skulu inn á Skála.

Ein sigur til VÍF í hesum dystinum hevur við sær, at avgerðin má bíða til seinasta umfar, meðan alt annað enn ein sigur merkjur, at Neistin verður føroyameistari eina viku áðrenn kappingarárið endar.



*Hjalmar Klein Olsen heldur ikki, at tapið hjá StÍF verður nakar fyrimunur fyri VÍF*

# Sjálvsálitið er gott

*Eftir dystin sunnudagin, har Neistin endaliga setti StÍF uttan fyri, tá talan er um FM-gullið, hittu vit toppskjúttan í dystinum, Áka Olsen.*

JÁKUP MØRK

Áki hevur gjøgnum alt árið verið ein av høvuðsstuðlunum undir góðu neistaúrslitunum, men sjáldan man avrikið hava verið so sjónligt og avgerandi sum í dystinum á Skála.

### Mansverja gav rúmd

Spurdur um, hvørt tað var nøkur serlig orsøk til, at tað lá somikið væl fyri sunnudagin, helt hann, at tá mótstøðuliðið leggur seg eftir at mansverja Heina Joensen, gevur hetta sjálvandi nógv pláss til hinar leikararnar.

- Eisini kom Marius rættuliga langt út, tá hann vardi fyri mær, og hetta gav eisini fleiri møguleikar til viðleikarar mínar, men tíverri hevði Johan ein sera góðan dag, har hann tekur eina rúgvu av skotum, heldur Áki fyri.

Tað skerst tó ikki burtur, at málini, sum Áki fekk móti endanum av dystinum høvdu sera stóra ávirkan á úrslitið, og hetta ásannar vestmenningurin eisini. Hann legði tó afturat, at avgerandi løtan helst var, tá Bogi bjargaði royndini frá Artur, tá hesin hevði møguleika at økja upp í 24-20.

- Eg veit ikki, hvussu hann gjørdi, men hann fekk so fótin á bóltin, og tá vit so fáa tvey skjót mál, er dysturin aftur víðopin, helt Áki fyri.

Hann helt annars, at neistaleikararnir gjøgnum allan dystin høvdu brent í so nógvar møguleikar, har skot vórðu send á stongina og við síðuna av, men hetta kemst eisini av, at Johan stóð somikið væl.

### Vilja fegnir hava hjálp

Nú bert tveir dystir eru eftir at leika, er einki at dylja yvir, at Neistin er sera nær fyrsta FM-hetinum síðani 1978.

Tveir dystir eru eftir, og møguliga lagar tað seg soleiðis, at seinasti dysturin í Vestmanna, har Áki skal hitta fyrrverandi liðfelagarnar verður avgerandi fyri gulldystin.

Áki sigur tó, at teir enn ikki eru farnir at hugsa um henda dystin, men hann leggur kortini afturat, at tað kann gerast sera strævið, um talan her verður um ein finaludyst at kalla.

Verður hetta støðan, eru vestmenningar helst favorittar, um tað ber til at tosa um favorittar.

- Sjálvsálitið er sjálvandi í toppi, nú vit hava vunnið 10 dystir á rað, men kortini meti eg, at royndirnar hjá vestmenningum kunnu koma teimum til góðar í einum slíkum dysti, og tískil hava vit einki ímóti, at StÍF rættir okkum eina hjálpandi hond komandi vikuskifti.

At enda spurdu vit Áka um, hvør munurin var á avrikunum hjá Neistanum í grundspælinum og endaspælinum, og her helt landsliðsleikarin, at tað serliga var stríðsviljin, sum gjørdi munin.

Í grundspælinum fóru vit ofta niður við høvdinum, men seinastu dystirnar hava vit veruliga arbeitt fyri sigrunum, og hetta hevur eisini givið úrslit, sigur Áki Olsen at enda.

Hvørt hesin stríðsvilji verður gull verdur, fæst so at vita um einar tvær vikur ella so

# Avgreiðsluspurningur

*Hondbóltur: Kvinnuliðið hjá Tjaldrinum hevur enn einki stig fingið hetta kappingarárið, og dysturin móti Kyndli sunnudagin tóktist bert at vera ein avgreiðsluspurningur*

JÁKUP MØRK

Tá kyndilskvinnurnar sunnudagin fóru til Runavíkar at takast við Tjaldrið, mundu tey flestu vera samd um, at talan fór at vera um tvey trygg stig til frákoyrdu føroyameistararnar.

Alt árið hevur Tjaldur verið niðasta liðið á stigatalvuni, og alt árið hevur null staðið í teiginum fyri vunnar dystir, hóast tær onkuntíð hava verið nær við at fingið okkurt stigið til høldar.

### Einki at tosa um

Sunnudagin vóru tær tó ongantíð nær við at fáa nakað stig frá Kyndli, tí til tess var styrkismunurin millum liðini bæði alt ov stórur.

Kyndil legði seg á odda 3-0 áðrenn Tjaldur svaraði aftur, og eftir hetta kom Tjaldur ongantíð nær námind kyndilsliðnum.

Serliga var stórur munur á fyrsta korterið, tá Kyndil økti leiðsluna upp í átta mál. At heimaliðið eftir hetta megnaði at fylgja gestunum í málskjótingini komst einamest av, at kyndilsgenturnar settu leikferðina niður, tá tað varð teimum greitt, at í hesum dystinum gjørdu tær sjálvar av, hvat skuldi henda.

### Gávu úr Vági

Uttan iva høvdu kyndilsgenturnar væntað, at dysturin í Runavíkini fór at kasta tvey stig av sær, men umframt hesi bæði stigini fingu tær eisini eina gávu úr Vági sunnudagin, tá tað frættist at VÍF hevði tapt móti VB.

Hetta gevur nevnliga Kyndli møguleika fyri at vinna sær bronsumerkini, og hóast hetta kanska ikki tykist av so nógvum, tá talan er tvífaldar føroyameistarar, so man hetta kortini vera betur enn eitt fjórða pláss, sum einki hálsprýði kastar av sær.

Hetta krevur tó ein sigur á VB komandi sunnudag, og hóast kyndilskvinnurnar ikki hava verið so grammar seinastu dystirnar, so vilja tær helst enda árið við einum sigri.

### Enda í Klaksvík

Tað er langt síðani staðfest, at Tjaldur endar árið á niðasta plássinum, og tá tær einki stig hava fingið higartil í kappingini, so er lítil vón fyri seinasta dystinum, sum verður um tvær vikur.

Tá skal Tjaldur nevnliga á vitjan í Klaksvík, har nýkosnu føroyameistararnir úr Klaksvík taka ímóti. Hóast tær longu hava tryggjað sær FM-heitið, so skulu runavíkingarnir helst ikki vænta sær nakra blíða móttøku, tá tær koma til Klaksvíkar.

Uttan iva vilja Klaksvíksgenturnar enda árið við einari rættuligari uppvísing, so ein kann bert gita um úrslitið til ta tíð.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar**
Tjaldur: Sunrid Gleðisheygg 5 (1), Sonja Gleðisheygg 4 (1), Kristine Ellingsgaard 2, Hansa Mikkelsen 1, Elinbjørg Hammer 1, Oddvá Fossdalsá 1, Beinta Joensen 1
Kyndil: Lotte Sørensen 9 (4), Jórun Ludvig 7, Anya Midjord 3, Rakul Joensen 3, Palma Petersen 1, Frida Johannesen 1
**Brotskøst:**
Tjaldur 2, Kyndil 5
**Útvísingar:**
Tjaldur 1, Kyndil 2
**Dómarar úr Neistanum:**
Hjalmar Petersen og Kristian Johansen